# Dreymurin um eina kongavitjan

**Triðja konsertferðir í røðini av FO/DK konsertferðum, verður í næstu viku, tá The Dreams taka donsku The Royal Highness við sær á eina konsertferð kring Føroyar**

FO/DK KONSERSTFERÐIR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*The Royal Highness eru eitt av teimum mest lovandi nýggju donsku nøvnunum.*

Í næstu viku verða konsertir við The Dreams og danska bólkinum The Royal Highness í Kagganum, Atlantis og Ítróttarhøllini á Kambsdali. Konsertferðin er liður í konsertrøðini FO-DK Konsertferðir.

### The Royal Highness

The Royal Highness er ein danskur tónleikabólkur á veg fram við rúkandi ferð. Teir spæla rokk við íblástri úr góðum amerikanskum rokki frá 70-unum. Sjálvt um bólkurin bert hevur 1 ár á baki, hevur hann longu fingið bjóðað og tikið av ein útgávusáttmála við heimsins størsta útgávufelag, EMI Music Publishing.

Umboðsmaður hjá bólkinum er Jonathan Morley, sum eisini umboðar nøvn sum Tina Dickow og Hush, hetta er báðir bólkar, ið hava hitað upp fyri Teitur.

The Royal Highness hevur eisini fingið eitt samstarv í lag við fløguframleiðararnar Alain Johannes og Natashu Shneider, sum hava arbeitt saman við millum øðrum Queens of the Stone Age og Chris Cornell.

Bólkurin var umboðaður á Spot-festivalinum í ár, og hevur eisini verið á eini umfatandi konsertferð í Danmark í ár. Í september og oktober var bólkurin harafturat á konsertferð í USA, har hann bleiv sera væl móttikin. Tónleikararnir í The Royal Highness eru Dennis Kasten (gittar og sang), Thomas Broge-Starck (bass), Mads Valther Jensen (trummur) og Fridtjof Nilsen (gittar og kór). Harafturat hava teir egnar ljóð- og ljósmenn við sær til Føroyar.

### The Dreams

The Dreans gjørdu rættuliga vart við seg, tá teir gjørdust nummar 3 út av 3.000 tónleikabólkum úr øllum Evropa í sendingini The A Cut, sum bleiv send á MTV Europe. Tey, sum valdu bólkarnar út vóru kenda songkvinnan Anastasia og ein A&R umboðsmaður hjá plátufelagnum Sony. The Dreams vóru so væl umtóktir, at teir í januar eru bodnir yvir aftur til London til eina showcase fyri Sony og øðrum plátufeløgum har. Bólkurin spælir popp-punk, og løgini eru sera melodiøs og fangandi. Limirnir í The Dreams eru Hans-Edward Andreasen (sang og gittar), Eirikur Corfitz Andersen (bass og kór) og Heini Mortensen (trummur).

### Triðja konsertferðin

Hetta er triðja konsertferðin í røðini FO-DK Konsertferðir, sum eru fyriskipaðar av Norðurlandahúsinum, FUT, DJBFA og Dansk Artistforbund. Konsertirnar eru stuðlaðar av Atlantic Airways. Konsertin hesuferð í Ítróttarhøllini í Kampsdali er tó eisini fyriskipað saman við Showtime Sound Lightning við Mark Joensen.

Konsertirnar við The Dreams og The Royal Highness verða í Kagganum hóskvøldið 15. desember kl. 20.00, Atlantis fríggjakvøldið 16. desember kl. 19.00, og Ítróttarhøllini á Kambsdali leygarkvøldið 17. desember kl. 23.30. Í Kambsdali spæla eisini Páll Finnur Páll, og aftan á ta konsertina verður Super Diskotek við DJ Switch. Atgongumerki fáast við dyrnar.

Meira kann lesast um hesa konsertferðina á www.nlh.fo, www.atlantis.fo, og www.kaggin.fo. Til ber at lesa um The Dreams og The Royal Highness og lurta eftir tónleiki hjá bólkunum á www.the-dreams.com og theroyalhighness.dk.




Løgfrøðingur til skrivstovuna hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini

Starvið sum løgfrøðingur á skrivstovuni hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini, sum er undir stovnan, er fulltíðarstarv. Skrivstovan verður sjálvstøðug eind á Almannastovuni.

Høvuðsbarnaverndarnevndin

Nevndin tekur avgerðir sambært barnaverndarlógini um m.a.:

- Umsorganaryvirtøku í málum, har samtykki ikki er fingið frá foreldrunum.
- Samverurætt foreldranna í sambandi við umsorganaryvirtøku og skipan av hesi.
- Rætt til ókeypis umboðan í málum um umsorganaryvirtøku og samverurætt, og um familjuviðgerð o.a fyribyrgjandi fyriskipanir og skal m.a. góðkenna avgerðir hjá barnaverndarnevndum.
- Familjuviðgerð á stovni hjá landinum og tilboði um serdagstovn til børn, sum ikki kunnu integrerast í vanligan dagstovn.
- Kanning og viðgerð av einum barni, ið er sett í verk uttan samtykki foreldranna.
- Forboð ímóti flyting heimaftur av einum barni, sum er sett heiman við samtykki foreldranna.

Løgfrøðingurin hevur til uppgávu at fyrireika mál og skal tryggja, at málini eru væl lýst, áðrenn tey verða løgd fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina.

Harumframt hevur løgfrøðingurin ábyrgdina av at skipa og leggja til rættis arbeiðið á skrivstovuni. Løgfrøðingurin verður við til at avgera førleikakrøv, arbeiðstíð o.a. hjá tí/teimum starvsfólki/um, ið verða sett á skrivstovuni afturat løgfrøðinginum.

Løgfrøðingurin verður partur av einum stovni, sum alla tíðina má tillaga seg broytingarnar í samfelagnum og taka við avbjóðingunum, sum liggja í tíðini og í framtíðini.

Okkara ynski er, at viðkomandi, ið verður settur, er virkin og nærlagdur, hevur góð samstarvsevni, dugir at leggja tilrættis og arbeiða sjálvstøðugt við at loysa settu uppgávurnar, og annars arbeiða í samsvari við endamál og málsetningar stovnsins.

Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra, á telefon 21 54 80.

Skrivlig umsókn skal vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 20. desember 2005 kl. 12.

Send umsóknina til
Almannastovuna,
Smyrilsvegur 20,
postboks 3096,
110 Tórshavn.

almannastovan
www.almannastovan.fo